**Tala – Sjúkrarøktarfrøðingar og Master í fólkaheilsu fáa handað prógv 3. juli 2020**

Takk fyri at eg fekk uppgávuna at siga nøkur orð, nú tit hava lokið prógv; 25 sjúkrarøktarfrøðingar og 2 master í fólkaheilsu.

Eyðsæð er, at tað er ymiskt, hvussu vit menniskju leggja okkara lívsleið. Ein partur av okkum leggur sína lívsleið eftir vinnuligum áhugamálum, og tað er eisini tørvur á hesum vinklinum í einum samfelagi. Tit, sum hava valt lívsleiðina innan sjúkrarøktarfrøði og fólkaheilsu, hava lagt lívsleiðina eftir trivnaði, umsorgan, vegleiðing og linna hjá teimum, har sjúka er íkomin. Slíkum fólki hava vit tørv á í Føroyum. Tá fólkið hevur tað gott og trívist, sæst tað aftur í øll samfelagnum.

Fyrstu bachelor sjúkrarøktarfrøðingarnir vórðu útbúnir í 2007. Sjúkrarøktarfrøði-útbúgvingin er støðugt ment gjøgnum hesi árini og er á støði við útbúgvingina í okkara Norðurlondum.

At vit í Føroyum eru komin so langt, at vit nú hava fleiri akademiskar lærugreinir at bjóða, sum eru á sama støði og samsvarandi donskum og útlendskum krøvum til lærugreinirnar, er at gleðast um.

Á heimasíðuni hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar sæst í endamásorðingini fyri útbúgvingini millum annað:

"Endamálið við útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing er at geva teimum lesandi førleika til at kunna virka sjálvstøðugt sum sjúkrarøktarfrøðingar og vera við í tvørfakligum samstarvi. Útbúgvingin skal, í samsvari við ta samfelagsligu, vísindaligu og

tøkniligu menningina og tørvin á sjúkrarøkt, geva teimum lesandi førleika í ástøðiligum og kliniskum sjúkrarøktarkunnskapi."

At seta orð á týdningin av sjúkrarøkt, umsorgan og fyribyrging er trupult, tí tað rakar so breitt. Tó vita vit, at fær tann sjúki røttu umsorganina og røktina saman við kunning um fyribyrgjandi átøk, er skjótari og lættari hjá tí sjúka at koma fyri seg og aftur kunna virka í samfelagnum. Hetta vísir, at viðgerð, røkt og kunning hanga óvíkiliga tætt saman.

Vón mín er - og er avgjørt tann rætti vegurin fram, haldi eg, at arbeiðið við fyribyrging framvegis verður sett høgt í samfelagnum, og at úrslitið støðugt fer at lætta um í Heilsuverkinum. At fólk á ein natúrligan hátt verða mint á at hugsa um heilsuna og ikki minst, at avleiðingin verður, at færri verða innløgd til sjúkraviðgerð.

Í endamálsorðingini stendur eisini, at sjúkrarøktarfrøðingar skula stuðla sjúklingum, familjum eins og bólkum og meta um og brúka teirra likamligu, sálarligu, sosialu og andaligu møguleikar í tí umhvørvi, tey liva í.

Hetta merkir, at sjúkrarøktarfrøðingar eru ein sentralur partur og skula lyfta og lofta tann veika partin av samfelagnum, teimum sum tørva stuðul og røkt.

Sum sjúkrarøktarfrøðingar koma tit helst í størv, har virksemi er allar 24 tímarnar í samdøgrinum. Spurt verður ikki eftir klokku, tá talan er um sjúku. Í einum sjúkrahúsi ella ellisheimi eru sjúkrarøktarfrøðingar tøkar alt samdøgrið, tí har skal altíð vera manning á vakt at ansa sjúklingum ella búfólkum.

Hetta kann vera hart, tá man veit, at hini sova sín søta svøvn heima, og tað man vera ein avbjóðing at skula sova, tá hini í familjuni eru uppi. Tit hava valt hesa lívsleiðina og hava vitað, hvat fakið fevnir um. Gott at eiga slík fólk, sum vilja veita røkt og viðgerð, hvat tíð á samdøgrinum talan er um, og sum seta sín egna tørv til viks.

Sum nýklaktir sjúkrarøktarfrøðingar fara tit at merkja, at samstarv er sera týdningarmikil partur í starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur. Sum tað eisini stendur í endamálsorðingini, fara tit at verða partur av toymum, samansettum við starvsfólkum við ymiskum førleikum og servitan.

Ógvuliga týdningarmikið er við góðum samstarvi í eini oftast truplari støðu. At síggja virðið í hvørjum øðrum, so úrslitið kann ganga upp í eina hægri eind, er sera týdningarmikið, tí eingin klárar at lyfta allar uppgávurnar einsamallur.

Hjá tykkum, sum fáa handað prógv í dag, er tað sermerkta, at tá tit vóru í ferð við at skriva tykkara serritgerð, varð hetta arbeiðið avbrotið vegna koronusmittuna. Samfelagið broyttist 360 gradir eftir einum degi. Alt samfelagið varð niðurlæst, eisini sjúkrarøktarfrøðiskúlin. Øll undirvísing steðgaði, og tit máttu fara heim. Tíðin var eisini komin til, at tit skuldu skriva serritgerðina.

Broytta støðan gjørdi, at bæði innan Sjúkrahúsverkið og ellis- og røktarheim varð lýst eftir sjúkrarøktarfrøðingum, sum tey høvdu stóran tørv á, nú koronafarsóttin hevði lagt seg yvir landið. Ístaðin fyri at sita heima og skriva serritgerðina, og hóast tit ikki vóru lidnar við útbúgvingina, fóru tit kortini til arbeiðis. Í hóttandi kononutíðini gjørdu tit eitt megnararbeiði og vórðu samstundis noyddar at skerja tykkara vinaskara, fyri ikki at bera smittu inn á sjúkrahús ella ellisheim. Hetta eiga tit eitt stórt herðaklapp fyri.

Fyri tveimum árum síðani, mitt í lestrartíðini, flutti hetta holdið av lesandi úr Jónas Broncksgøtu, har sjúkrarøktarfrøðiskúlin lá, út higar í Sjóvinnuhúsið á Vestarubryggju, sum nú er partur av Setrinum.

Tit eru sostatt tey fyrstu, sum hava lisið í hesum umhvørvinum, sum fyri nøkrum árum síðani var eitt kent vinnulívsøki, har fiskaroykurin so ramur lá yvir bygningarnar. Hvør skuldi trúð, at hetta umhvørvið skuldi fara at verða eitt lestrarøki á universitetsstøði; fult av ungdómi, sum vónrík nemur sær kunnleika í føroyskum umhvørvi.

Eitt annað, sum er sermerkt fyri henda árgangin er, at tit allar sum ein hava valt evni til serritgerð, sum snýr seg um eldraøkið. Hóast vit politiskt eru býtt upp í økir, eru vit kortini tengd tætt hvør at øðrum.

Sjúkrarøktarfrøðin liggur politiskt undir heilsuøkinum og er ein partur av hesum øki. Hóast tað, so fyllir sjúkrarøktarfrøðin eisini nógv innan onnur øki, eitt nú tað kommunala økið. Har tað er brúk fyri røkt og umsorgan, er tørvur á tykkum.

At enda fari eg at ynskja tykkum sjúkrarøktarfrøðingum og master í fólkaheilsu hjartaliga til lukku við útbúgvingini og øll góð ynski í tykkara komandi størvum.

Kaj Leo Holm Johannesen